

Mynd: BP

# Oljufeløgini hava blakað pengar eftir fólki

**Jógvan Hugo Gardar**

22.11.2015 - 12:32

Oljan.fo

Leif Sande, ið er fakfelagsleiðari í norska Industri Energi, meinar at oljufeløgini kunnu takka sær sjálvum fyri at lønirnar eru so høgar í oljuvinnuni.

Í eini samrøðu sum er løgd út sum podcast hjá Sysla.no sigur Leif Sande at tá ein hevur ein arbeiðsgevara sum blakar pengar eftir fólki, so má tað gerast dýrt at reka boripallarnar. Í eini frágreiðing, kallað IRIS-fragreiðingin, kemur fram at meðalinntøkan hjá teimum sum arbeiða á boripallunum er 850.000 norskar krónur um árið. 25 prosent av hesum er yvirtíð.

- hygg til dømis eftir teimum sum standa fyri matgerðini umborð á pallunum, sum hava somu lønaravtalur, har er næstan eingin yvirtíð. Men oljufeløgini hava ikki havt fyri neyðini

at halda eygu við kostnaðinum, og hava goldið tað sum tey hava fingið krav um uttan at blunka. Og nú fáa vit skuldina fyri at hetta er blivið ov dýrt, vísir Leif sande á.

Í sama podcasti sigur fyrrverandi oljutíðindamaðurin Arnt Even Bøe, at arbeiðstakarasíðan kanska hevur verið í so huga at verja síni rættindir á pallunum.

- Um oljuarbeiðarar hava ov dýrar skipanir, sjálvt um arbeiðsgevararnir vilja gjalda fyri tær, so kunnu teir vera við til at teirra arbeiðspláss hvørva. Í dag kunnu oljufeløgini skjótt sita í landi og stýra virkseminum á boriøkjunum, sigur Bøe. Hann vísir tó samstundis á at allar avtalurnar á oljuøkinum eru gjøgnumførdar umvegis fríar samráðingar.